# Embætisprógv í lóg

| VANGAMYND |
|---|
| **Embætisprógv í lóg (Emb.L.)**<br>***Master of Legal Practice (MLP)*** |

| | |
|---|---|
| **SLAG AV ÚTBÚGVIING OG ÁRAMÁL** | Løgfrøðilig embætisútbúgving. 120 ECTS. 2 ár. |
| **ÚTBÚGVINGARSTOVNUR** | Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og samfelagsdeildin. |
| **STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR** | Uttanríkis- og Mentamálaráðið (UMMR). Viðvíkjandi lógarfestum løgfrøðiligum embætum: viðkomandi danskir myndugleikar. |
| **TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL** | Í gildi frá heysti 2022. |
| **STIG** | “2nd Cycle” sambært QF-EHEA og stig 7 sambært EQF-LLL. |
| **FORTREYTIR** | Bachelor í lóg. |

| A | ENDAMÁL |
|---|---|
| | At geva tí lesandi førleikar á høgum stigi í løgfrøði. Tey útbúnu skulu fata og greina lóg og løgfrøði við atliti at serføroyskum rættarevnum og lóg í smáum løgdømum. |

| B | EYÐKENNI | |
|---|---|---|
| 1 | **GREINAR / EVNISØKI** | Skeiðini á útbúgvingini eru skipað í tríggjar bólkar: (1) dogmatisk almennrættarlig skeið, (2) dogmatisk privatrættarlig skeið og (3) háttalagslig skeið. Seinasti parturin stendur í eini Emb.L. ritgerð, sum tann lesandi sjálv/ur velur. Tær fýra lestrarhálvurnar eru skipaðar so:<br><br>Fyrsta lestrarhálva: Tvey skeið eru kravskeið: Skattarættur og Lóggávulæra (ástøði og venja viðvíkjandi lóggávu). Harnæst mugu lesandi velja eitt av hesum valskeiðum: Kirkjurætt ella Sosialrætt (valskeið á øllum lestrarhálvum kunnu væntast broytt ella endurskoðað seinni.)<br><br>Onnur lestrarhálva: Kravskeið eru Altjóða privatrættur og ES-rættur. Av valskeiðum mugu lesandi velja eitt av hesum: Mannarættindi, Havrætt eller Fíggjarrætt.<br><br>Triðja lestrarhálva: Føroyskur stjórnarskipanarrættur II og skriving av Emb.L. ritgerð eru kravskeið. Umframt mugu lesandi velja eitt av hesum sum valskeið: Trotabúðarætt, Kollektivan arbeiðsrætt ella Almennan starvsfólkarætt.<br><br>Fjórða lestrarhálva: Kravskeið eru Fiskiveiðurættur og seinni partur av Emb.L. ritgerð. Lesandi mugu harnæst velja millum eitt av hesum trimum valskeiðum: Byggi- og skipanarlóg, Altjóða íløgurætt ella Heilsurætt.<br><br>Emb.L. ritgerðin er 20 ECTS. Ritgerðin má sýna løgfrøðiliga fatan á høgum stigi. Ritgerðin verður latin inn í tveimum innlatingum, fyrri partur móti endanum á triðju lestrarhálvu og seinni partur í endanum á fjórðu lestrarhálvu. |
| 2 | **ALMENNUR/ SERLIGUR DENTUR** | Generalistisk tilgongd til lóg, tillagað føroyskt høpi. |

| | | |
|---|---|---|
| 3 | **KÓS** | Rannsóknir og greinan, lagað til løgfrøðiliga praksis. |
| 4 | **SERLIG EYÐKENNI** | Undirvísingarmálið er í høvuðsheitum føroyskt. Eitt 10 ECTS skeið skal altíð verða undirvíst á enskum. Undirvísingartilfar er, alt eftir evni, grundað á øll hesi mál: føroyskt, danskt, enskt og, í minni mun, norskt.<br><br>Undirvísingin er knýtt at smáum løgdømum og samfeløgum í broyting, sum eitt nú lýst gjøgnum skeið um ástøði og venju innan lóggávu (Lóggávulæra) og hvussu rættarstøða mennist í roynd og veru (Úrskurðir og læra).<br><br>Bulurin í dogmatisku skeiðunum er í flestu førum grundaður á danskan rætt, men er ikki altíð eins væl dagførdur sum galdandi donsk lóg. Serligar tillagingar til føroyskan rætt síggjast ofta kring almennan rætt, so sum Føroyskan stjórnarskipanarrætt II, Fiskiveiðurætt og Byggi- og skipanalóg, og háttalagslig skeið sum Lóggávulæru og Úrskurðir og læru. |

| **C** | **STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING** | |
|---|---|---|
| 1 | **STARVSMØGULEIKAR** | Ùbúgvin kunnu taka við størvum sum advokatur, dómari ella ákæri og sum almenn tænastufólk, har hægri løgfrøðilig útbúgving er kravd. |
| 2 | **FRAMHALDSÚTBÚGVING** | Løgfrøðingar, sum hava staðið seg væl á hesi útbúgving, kunnu fara undir PhD lesnað í lóg ella samsvarandi. |

| **D** | **ÚTBÚGVINGARHÁTTUR** | |
|---|---|---|
| 1 | **ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING** | Undirvísingin er í høvuðsheitum grundað á eina sjálvstøðuga og fleirtáttaða tilgongd, har tann lesandi er í miðdeplinum og sjálv/ur tekur ábyrgd av egnari læring.<br><br>Tilgongdin til undirvísing er merkt av fyrilestri, bólkaarbeiði, heimauppgávum, sjálvlesnaði, kjaki og tímauppgávum.<br><br>Ein flokkur av løgfrøðilesandi er at meta sum eitt samfelag í samrøðu, og tá mangar royndir standa í uppgávum og innlatingum, sum aftur eru treytaðar av, at fylgt hevur verðið við í undirvísing og tí kjaki og samrøðu, sum har fer fram, væntast lesandi at møta til undirvísing á staðnum og at taka aktivt lut í undirvísingini. |
| 2 | **PRÓVTØKUHÆTTIR** | Útbúgvingin er merkt av eini áhaldandi og formativari próvmeting. Próvmetingin stendur í eini røð av ymiskum royndum, ofta spjadd yvir ymiskar partar av skeiðnum og/ella verkætlanum av ymiskari støddi og ymiskari samanseting, so sum munnligar royndir, skrivligar royndir, fleirvalaroyndir (multiple-choice), “tak-heim-við-royndir”, rit, frágreiðingar, framløgur í tímanum o.s.fr.<br><br>Próvtøl verða givin sambært 7-tala stiganum. Minst 1/3 av øll próvtøkum skulu vera uttanhýsis.<br>. |

| **E** | **ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR** |
|---|---|
| 1 | **ALMENNIR FØRLEIKAR** |
| | **Analytisk hugsan:** Evni til abstrakta og greinandi hugsan og at seta saman tankar (idéir).<br>**Refleksiv evni:** Evni til at meta um lóg og rættarskipan á refleksivan hátt.<br>**Konstruktiv og dekonstruktiv evni:** At kunna byggja upp (konstruera) og laga sundur (dekonstruera) løgfrøðilig argument.<br>**Innlit í egna læring:** Kunna eyðmerkja egnan lærutørv og skipa egna læring.<br>**Munnligt og skrivligt samskifti á egnum og fremmandum máli:** Kunna orða løgfrøðilig argument á greiðan, skipaðan og væl grundgivnan hátt, á føroyskum, enskum og donskum.<br>**Samskifta í høpi:** Evni til at taka atlit til høpi (kontekst) í sambandi við at miðla løgfrøðiliga vitan til móttakarar, sum ikki hava løgfrøðiliga útbúgving. |
| 2 | **FAKLIGIR FØRLEIKAR** |
| | **Lóg og løgfrøðiligt háttalag**: Fata løgfrøðiligt háttalag, løgfrøðiliga hugsan og samfelagsligu ábyrgd løgfrøðinga.<br>**Ítøkiliga at nýta løgfrøðiliga vitan:** Evni til at nýta viðkomandi og rætt løgfrøðiligt háttalag í sambandi við ítøkiligt mál.<br>**Ráðgeving:** Kunna ráðgeva um løgfrøðiligar spurningar.<br>**Orða lógir og løgfrøðilig skriv**: Sjálvstøðugt kunna orða løgfrøðilig skjøl, eitt nú lógir og kunngerðir. |

| | |
|---|---|
| | **Loysa rættarósemjur:** Loysa ítøkiligar rættarósemjur, íroknað at kunna identifisera rættarliga viðkomandi fakta í umfatandi faktuellum og løgfrøðiligum tilfari.<br>**Evni at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum:** Sjálvstøðugt, og í samstarvi við onnur, at kunna leggja til rættis og skipa løgfrøðiligar arbeiðsuppgávur og geva ítøkilig boð uppá loysnir.<br>**Løgfrøði í lítlum samfelag**: Hava fatan av tí serstaka høpi, sum skipar og avmarkar stovnar í lítlum samfelag, og skilja mørk og karmar fyri løgfrøði í lítlum samfelag. |

| F | FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNI FRÁ ÚTBÚGVINGINI |
|---|---|
| | **Við lokna útbúgving skal tann lesandi vera før/ur fyri at:**<br>• Lýsa føroysku rættarskipanina og løgligu stovnar hennara.<br>• Lýsa rættarkeldur, grundarlag og meginreglur fyri lógartulking.<br>• Greiða frá og meta um lóg sum heild og at eyðmerkja sertøku avbjóðingarnar fyri lógartulking í smáum samfelag í samspæli við størri statsliga skipan.<br>• Greina fordømi frá dómstólum og meta um týdningin fyri verandi og framtíðar dómsúrskurðir.<br>• Greiða frá og viðgera týdningin av løgfrøðiligari ástøði og løgspeki fyri lógartulking, og hvussu ymisk ástøði kunnu rættvísgera ymiskar tulkingartilgongdir.<br>• Lýsa og meta um avbjóðingarnar, ein løgfrøðingur fær í førum, har lítið er til av lóg, og har lóg er illa skipað, sum ofta er støðan í smáum løgdømum.<br>• Greiða frá og greina lóg í truplum dogmatiskum økjum.<br>• Greina rættarspurningar í Emb.L. ritgerð. |